# óðurin vanda

## Vit eru farin í hernað og fara at vita, hvussu langt tað røkkur

# SIGA ONKI

Tað hevur ikki borið til at fáa eina viðmerking frá Páll fanga ella Klaksvíkar Róðrarfelag. Forkvinnan í Klaksvíkar Róðrarfelag, Jórun Høgnesen, sigur, at tey fylgja støðuni, men at hon ongar viðmerkingar hevur nú. Hon sigur, at tey hava avtalað onki at siga enn.

**Men er Páll Fangi ein virðiligur føroyameistari?**

*- Eg havi onga viðmerking!*

# Gera snýtara til føroyameistara

## ÓLÓGLIGUR KAPPRÓÐRARBÁTUR

**Hetta kann ikki góðtakast, tí Róðrarsambandið kann ikki lata Páll Fanga sleppa at snýta seg til FM-heitið, sigur formaðurin í róðrarfelagnum á Tvøroyri**

Áki Bertholdsen

- Í mínum ugaheimi kann ein bátur, sum snýtur, ikki verða føroyameistari.

Tað staðfestir Niels M. Jacobsen í Fámjin, sum er formaður í Froðbiar Sóknar Róðrarfelag, sum eigur Tvørabátin.

Tvørabáturin er ein av teimum 11 seksmannaførunum, sum fara at boykotta kappróðurin á ólavsøku, fær Páll Fangi úr Klaksvík, ikki harðari revsing fyri at hava róð við ólógligum báti á nøkrum stevnum í summar.

Róðrarsambandið sigur, at tað kann prógvast, at Páll Fanga hevur verið ólógligur á Norðoyastevnu og á Jóansøku og afturfyri tað er hann dømdur at fáa tvey gul kort.

Sostatt varðveitur hann øll stigini, hann hevur fingið og eftirsum hann hevur vunnið allar stevnurnar í ár, kann hann longu kalla seg føroyameistara, tí nú kann ongin fáa hann aftur.

Sum tað sæst í øðrum greinum í blaðnum, vilja manningarnar á 11 seksmannaførum ikki góðtaka hesa avgerðina og hava kunngjørt, viðgerð Róðrarsambandið ikki málið av nýggjum og revsar Páll Fanga harðari, fara tey øll somul at boykotta ólavsøkuróðurin.

Men tað er eisini greitt, at avgerðin hjá Róðrarsambandinum verður kærd til dómsnevndina.

Tað gjørdi Froðbiar Sóknar Róðrarfelag nevniliga í gjárkvøldið.

Róðrarsambandið hevur síðani seks dagar at viðgerða kæruna í, men skal hon geva nakra meining, skal berast skjótari at enn so, tí ólavsøkuróðurin er longu í ovurmorgin.

### Harðari revsing

Niels M. Jacobsen staðfestir, at tey kunnu ikki góðtaka niðurstøðuna hjá Róðrarsambandinum um Páll Fanga og tí hava tey kært.

- Vit halda einasta revsing, sum kann koma upp á tal, er, at Páll Fangi antin missur stigini ella verður kolldømdur í teimum stevnum, har tað kann prógvast, at hann hevur verið ólógliga innrættaður.

Hann góðtekur ikki frágreiðingina hjá Róðrarsambandinum um, at ongin kæra er innkomin um Páll Fanga og at tað tískil ikki ber til at koma afturum aftur.

- Hetta er ikki eitt mál, sum hevur við eina hending á eini stevnu at gera. Hetta er eitt mál, har ein bátur er broyttur ímóti reglunum hjá Róðrarsambandinum og tað er heilt hvør sítt.

Hann vísir á, at rógvari á Páll Fanga hevur eisini alment viðurkent í Sosialinum mikudagin, at teir hava róð við báti, sum hevur verið ólgógligur.

Formaðurin í Froðbiar Sóknar Róðrarfelag sigur, at tað er hetta, tey gjørt Róðrarsambandið vart við.

- So má tað vera teirra uppgáva at kanna málið út í æsir og at kanna prógvini frá teimum stevnum, sum hava verið.

Hvussu langt aftur í tíðina skulu vit so fara? Skal ein bátur so eisini missa stig ,ella FM heitið, vissi ein mynd brádliga kemur undan kavi av onkrum báti, sum var ólógligur á onkrari stevnu fyri fleiri árum síðani?

- Hatta er ein spurningur, eg havi hugsað um. Men tað má standa til Róðrarsambandið at meta um í hvørjum einstøkum føri, sigur Niels M. Jacobsen.

*aki@sosialurin.fo*



**OYÐILAGT**

*Kappróðurin á ólavsøku er oyðilagdur. Einasti máti, Róðrarsambandið kann bjarga støðuni er at revsa Páll Fanga harðari, siga rógvarar kring landið, sum aftur fara at hava fund um støðuna í kvøld*

num er røtt og tað er rættiliga fallið honum fyri bróstið, at formaðurin í sambandinum longu hevur staðfest sína støðu í málinum og at kæran sostatt ikki verður tikin til eftirtektar.

- Men er tað rætt at døma við kraft, tí ongin hevur vitað um ólógliga bekklistan á Páll Fanga fyrrenn nú, sigur Mass Anthoniussen.

- Bara Tvørabáturin visti av hesum uppundir vestanstevnu og boðaði Róðrarsambandinum frá, men tá varð listin tikin av – um mannaførunum hjá monnum.

Hann staðfestir tískil, at alt róðrarumhvørvið er á gosi um avgerðina hjá Róðrarsambandinum.

- Sum støðan er nú, er kappróðurin á ólavsøku oyðilagdur og harvið eisini ein stórur partur av ólavsøkuni.

- Skal tað eydnast okkum at fáa eina siðiliga og hampuliga ólavsøku, má Róðrarsambandið broyta støðu, sigur Mass Anthoniussen.

*aki@sosialurin.fo*

## Ein bátur, sum hevur snýtt, kann ikki verða føroyameistari

afturvirkandi kraft, tá ið ongin kæra er komin?

- Hetta er ikki við afturvirkandi so Páll Fangi hevur fingið eitt prei um, at báturin skuldi kannast, veit eg ikki, sigur talsmaðurin hjá seks-

**Tað er hetta brotið í grein trý í reglugerðini hjá Róðrarsambandinum, sum manningarnar á teimum 11 seksmannaførunum vísa til, tá ið tey krevja Páll Fanga revsaðan fyri at hava róð ólógliga í ár**

***....Tað er ikki loyvt at broyta nakað við bátinum frá upprunastandi uttan við loyvi frá RSF....***